# Páskakonsertir við Kamarkórinum, strúkarum, urgu og solistum

Tórshavnar Kamarkór hevur tvær spennandi konsertir komandi dagarnar: Tann fyrra verður í Fríðrikskirkjuni á Toftum, Langa Fríggjadag kl. 16:00, og hin seinna verður í Vesturkirkjuni í Havn, leygardagin 23. apríl kl. 17:00.

Høvuðsverkið á konsertunum er Requiem hjá franska tónaskaldinum Gabriel Fauré (1845-1924). Hetta er kórverk í sjey pørtum, við solistum, urgu og strúkarum.

Sjálvur segði Fauré um hetta helst kendasta verk sítt: "Tað sigst at mítt Requiem einki sigur um deyðsótta, og onkur hevur rópt tað eina deyðans vøgguvísu. Men soleiðis síggi eg deyðan: ein eydnurík bjarging, ein stundan móti eydnuni omanfyri, heldur enn ein pínufull upplivilng".

Tvey onnur kórverk eru eisini á skránni. Tey eru Cantique de Jean Racine, Op. 11, eisini eftir Fauré, og Hear my Prayer hjá Felix Mendelsohn Bartholdy (1809-1847).

Til hesar konsertirnar hevur kórleiðarin, Bernharður Wilkinson, savnað eitt strúkiorkestur við níggju strúkarum. Leif Hansen leikar á urgu, og solistar eru Anne Mette Greve Klemensen, Arina Bischoff, Urd Johannesen og Herfinnur Árnafjall.




2011
# Páskastevnan


Carl G. Severin




Israel Pochtar

Í Kelduni, Skálafirði
21.- 25. apríl

| Skírisdagur / 21. apríl | Langi fríggjad. / 22. apríl | Leygardagur / 23. apríl | 1. Páskadagur / 24. apríl | 2. Páskadagur / 25. apríl |
|---|---|---|---|---|
| Ímillum morgunmøtini er ein steðgur á uml. 20 min., har kaffi v.m. er at fáa.<br><br>Barnaansing verður meðan morgunmøtini eru. | Morgunmøti / kl. 10.30<br>Lovsangur: Soli Deo Gloria<br>Tala: Hjørdis H. Petersen<br><br>kl. 12.00<br>Sangur: Signa og Miriam<br>Tala: Israel Pochtar | Vinnuseminar / kl. 11 - 12<br>v/Finn Johannessen frá VILT<br><br>Steðgur, ábit / kl. 12 - 12.30<br><br>kl. 12.30-13.30<br>v/ Súni Schwarts Jacobsen<br><br>Familjumøti / kl. 15.00<br>Sangur, søga, framførslur o. a. | Morgunmøti / kl. 10.30<br>Lovsangur: Oasan<br>Tala: Israel Pochtar<br>Breyðbróting<br><br>kl. 12.00<br>Sangur: Sigrid Sivertsen<br>Tala: Israel Pochtar | Morgunmøti / kl. 10.30<br>Lovsangur: Keldan<br>Tala: Símun Absalonsen<br><br>kl. 12.00<br>Sangur: Oda á Fríðufløtum<br>Tala: Poli Jacobsen |
| Kvøldmøti / kl. 18.00<br>Lovsangur: Keldan<br>Sangur: Zamar<br>Tala: Pauli Høj<br><br>Barnamøti / kl. 18.00<br><br>Filmskvøld | Kvøldmøti / kl. 18.00<br>Lovsangur: Keldan<br>Sangur: T.O.S<br>Tala: Carl G. Severin<br><br>Barnamøti / kl. 18.00<br><br>Awake XL / kl. 22.00<br>Eitt mega ungdóms kvøld, har tað kemur at hoyrast og síggjast. Dánjal Petersen ber fram Orðið. | Kvøldmøti / kl. 18.00<br>Lovsangur: Keldan<br>Sangur: Heine Lützen<br>Tala: Carl G. Severin<br><br>Barnamøti / kl. 18.00<br><br>Lovsangskvøld / kl. 21.30<br>"Frá hjarta til hjarta"<br>Eitt kvøld í Guds nærveru við lovsangi og tilbiðjan. | Kvøldmøti / kl. 18.00<br>Lovsangur: Keldan<br>Sangur: Lisa Frederiksberg<br>Tala: Carl G. Severin<br><br>Barnamøti / kl. 18.00<br><br>"Syngið við" / kl. 21.30<br>Nógv ymiskt á skránni: solistar, bólkar, felagssangur og vitnisburðar v.m. | Kvøldmøti / kl. 18.00<br>Lovsangur: Keldan<br>Sangur: Theodor Petersen<br>Tala: Israel Pochtar<br><br>Barnamøti / kl. 18.00 |

*Døgurði og annað verður til keyps aftan á morgunmøtini*

Kafeterian verður opin bæði áðrenn og aftan á møtini.
Her verður møguleiki at keypa døgurða, dessert, pizzastykkir, tvíflís, grill, kaffi, bollar v.m.

Keldan
- Streymar av livandi vatni

www.keldan.fo

KREA



